Álit

í

løgtingsmáli nr. 44/2025: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um áseting av skatti (Ásetingarlógin) (Hækking av barnafrádráttinum)

Bárður á Steig Nielsen, Helgi Abrahamsen, Magnus Rasmussen, Johan Dahl, Erhard Joensen, Eyðdis Hartmann Niclasen og Frimodt Rasmussen, tingfólk, hava vegna Sambandsflokkin lagt málið fram 4. november 2025, og eftir 1. viðgerð 7. november 2025 er tað beint Fíggjarnevndini.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi 11. og 24. november 2025.

Undir viðgerðini hevur nevndin havt fund við landsstýriskvinnuna í fíggjarmálum, Ruth Vang.

Undir viðgerðini hevur nevndin býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Eyðgunn Samuelsen, Ingilín D. Strøm, Dennis Holm, Hanna Jensen, Beinir Johannesen og Steffan Klein Poulsen) tekur ikki undir við málinum, men hevur ymiskar viðmerkingar.

Eyðgunn Samuelsen, Ingilín D. Strøm, Dennis Holm, Hanna Jensen og Beinir Johannesen hava hesar viðmerkingar:

Endamálið við uppskotinum er at hækka barnafrádráttin í landsskattinum við 4.000 kr. fyri hvørt barnið frá 1. januar 2026.

Undirritaðu halda, at hetta er eitt gott uppskot til at lætta munandi um hjá barnafamiljum, og tað verður eisini mett at kosta umleið 40 mió. kr. at seta í verk. Her kemur avbjóðingin við uppskotinum, tí skotið verður upp at fíggja batarnar við at strika niðurlaðingina av ríkisveitingini fyri 2025, og so steðga henni har.

Løgtingið hevur fyri stuttum samtykt eitt uppskot frá landsstýrinum um eina hækking av barnafrádráttinum upp á 1.500 kr. fyri hvørt barnið millum 0 og 6 ár og 1.000 kr. fyri hvørt barnið millum 7 og 17 ár (LM-017/2025). Tað uppskotið er eitt av fleiri átøkum við tí endamáli at lætta um gerandisdagin, har summi raka barnafamiljur og summi raka meira breitt: at strika mvg á eplum, grønmeti og barnablæum, at hækka lestrarstuðulin og at lækka ALS-gjaldið. Harumframt er útgjaldið frá Barsilskipanini hækkað, eins og fleiri batar eru gjørdir í barsilsskipanini.

Tað eru ymsar meiningar um, hvussu ein skal fíggja slíkar fíggjarligar lættar til barnafamiljur ella til alt fólkið. Undirritaðu taka ikki undir við at fíggja ein størri barnafrádrátt við at strika avtalaðu niðurlaðingina av ríkisveitingini. Og tá nú fleiri onnur uppskot um at lætta um hjá húskjunum í Føroyum eru framd ella ætlandi verða framd, so taka undirritaðu ikki undir við hesum málinum.

Steffan Klein Poulsen hevur hesar viðmerkingar:

At hækka barnafrádráttin er ein sera effektivir máti at lætta um gerandisdagin hjá barnafamiljum. Hendan loysnin rakar beint inn í húsarhaldið hjá barnafamiljum, og harumframt krevur hetta ikki nógva umsiting, sum nógvar aðrar loysnir oftani gera. Undirritaði tekur tí fult undir við, at hendan loysnin verður brúkt.

Barnafamiljur hava munandi størri útreiðslur enn aðrar familjur, og tí kemur tað væl við, tá hesin frádráttur verður hækkaður. Serliga eftir høgu inflatiónina seinastu árini.

Vísandi til niðurstøðuna hjá undirritaða í lm. 45/2025, so vildi tað tó verið óseriøst at tikið undir við hesum annars góða uppskotinum. Undirritaði má tó eisini vísa til lm. 17/2025, har Miðflokkurin longu hevur verið við til at hækka barnafrádráttin fyri fáum vikum síðani.

Við hesum viðmerkingum tekur meirilutin ikki undir við málinum og mælir Løgtinginum frá at samtykkja uppskotið.

Minnilutin (Magnus Rasmussen) hevur hesar viðmerkingar:

Dýrari og dýrari gerandisdagur rakar barnafamiljur í Føroyum serliga hart og ikki sæst fyri nakrari broyting til tað betra heldur.

Høgu prísirnir á matvørum og øðrum gerandisvørum, umframt høgir bústaðarprísir, gera tað trupult at fáa endarnar at røkka saman.

Fíggjarliga byrðan ger tí dagligdagin hjá barnafamiljum sera truplan, og tí vil Sambandsflokkurin við hesum lógaruppskotinum tryggja barnafamiljunum í Føroyum betri livikor.

Vit kenna øll til veruleikan, at í Føroyum hava vit eina demografiska avbjóðing. Vit gerast alsamt fleiri eldri borgarar, meðan vit mangla yngra fólkið, fólk í burðarførum aldri. Hetta er ein sera óheppin gongd.

Sambandsflokkurin hevur valt at koma við hesum uppskoti fyri at betra um livikorini hjá føroysku barnafamiljunum – bæði teimum, sum búleikast her og so eisini teimum, sum ynskja at seta búgv her og búleikast í Føroyum frameftir.

Uppskotið er eitt framsøkið uppskot, eitt uppskot, sum veruliga munar á fíggjarliga økinum hjá sperdu barnafamiljunum.

Uppskotið hækkar barnafrádráttin fyri hvørt barnið við heili 4.000 kr. – ein upphædd, ið veruliga munar.

Støðan í dag er, at landið letur ein frádrátt á 9.200 kr. í landsskattinum fyri børn millum 0 og 6 ár og 6.500 kr. fyri børn millum 7 og 17 ár.

Verður hetta uppskotið samtykt, so verður upphæddin í frádráttinum fyri tey yngru børnini 13.200 kr. og fyri tey eldru børnini 10.500 kr. Hetta er ein hækking á góð 43% fyri yngru børnini og 62% fyri eldru børnini.

Hetta er ein sera munagóð hækking í barnafrádráttinum hjá familjunum – ein hækking, ið veruliga munar.

Tað, sum er so sera gott við at hækka barnafrádráttin er, at her verða tað barnafamiljurnar, og bara barnafamiljurnar, sum fáa ágóðan og tað eru tær, sum - í hesum døgum - allarmest hava brúk fyri einum fíggjarligum átaki.

Við hesi munagóðu hækking av barnafrádráttinum, so hækkar samlaði frádrátturin í landsskattinum við uml. 52 mió. kr. um árið. Roknast kann við, at ein partur kemur inn aftur í øðrum avgjaldsinntøkum, tí hesin peningur kemur í umferð, so metti nettokostnaðurin er helst á leið 40 mió. kr. um árið.

Sambandsflokkurin hevur eitt greitt boð uppá, hvussu hetta skal fíggjast, og her kann verða víst til LM-045/2025: Uppskot til samtyktar um at hækka ríkisveitingina.

Við hesum viðmerkingum tekur minnilutin undir við málinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

Fíggjarnevndin, 26. november 2025

Eyðgunn Samuelsen forkvinna	Beinir Johannesen næstformaður	Ingilín D. Strøm
Dennis Holm	Hanna Jensen	Magnus Rasmussen
	Steffan Klein Poulsen	